

## Føroyingafelag í tungum sjógvi

Føroyingafelagið í Århus hevur tørv á fleiri virknum limum, skal felagið ikki detta niðurfyri. Felagið, sum heldur til í Áarstovu, hevur seinastu mánaðirnar havt sera torført við at fáa endarnar at røkka saman. Felagið sigur seg hava nógvar fastar útreiðslur, og skulu mongu rokningarnar gjaldast, mugu inntøkurnar vera tilsvarandi. Felagið livir av stuðli uttanifrá, men seinastu tíðina hevur tað gingið striltið við at fáa pening til vega. Hesi, og fleiri onnur viðurskifti eru orsøkir til, at felagið nú er í stórum fíggjarligum trupulleikum. - Skal Áarstova halda fram sum higartil, mugu broytingar henda. Millum annað mugu fleiri av limum felagsins koma upp í Áarstovuarbeiðið, soleiðis at arbeiðsbólkar kunnu setast, og mongu uppgávurnar deilast yvir á fleiri hendur, sigur felagið, sum tí inniliga heitir á allar limir um at møta upp til ársaðalfundin, ið stendur fyri framman. Aðalfundurin verður hildin 28. februar 2009 klokkan 14 í hølum felagsins á Vestergade 48d, 8000 Århus C, og tey vóna at nógv fólk møta.

# Tobbi krevur Kringvarpsfrágreiðing

**Í morgin fer Tórbjørn Jacobsen at spyrja Helenu Dam á Neystabø, um nakað hendir í Kringvarpsmálinum. Serliga vil hann vita, um Kringvarpið hevur nakrar ætlanir um at niðurlaða lýsingarnar**

KRINGVARP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Nógv rok hevur verið um Kringvarpið seinastu mánaðirnar. Kvirran hevur rátt í eina tíð, men nú vil Tórbjørn Jacobsen hava nøkur ítøkilig svar frá Mentamálaráðnum.

Í spurningunum vísir Tórbjørn Jacobsen á, at í álitinum til Kringvarpslógina, skuldu ongar lýsingar verða í almenna Kringvarpinum í ár 2011. Hann vísir somuleiðis á, at nú eru bert tvey ár, til hetta evstamark, og tí vil hann vita, um Kringvarpið hevur gjørt nakað ítøkiligt á hesi leið.

Somuleiðis kundi hann hugsað sær at vita, hvussu hesin politiski vilji sæst aftur í roknskapinum hjá Kringvarpinum.

Um so er, at Helena Dam á Neystabø ikki kann vísa á nakað ítøkiligt við teimum fyrru spurningunum, so kundi Tórbjørn Jacobsen hugsað sær at vita, um Helena Dam á Neystabø hevur gjørt Kringvarpið varugt við henda sterka politiska vilja.

Seinast vil Tórbjørn Jacobsen eisini hava svar uppá, hvussu nógvan pening Kringvarpið hevur til góðar millum fólk.

### Samt løgting

Í grundgevingunum fyri spurningunum vísir Tórbjørn Jacobsen á, at tað er var ein stórur politiskur vilji, at niðurlaða lýsingarpartin hjá Kringvarpinum, tí tað vóru heili 26 atkvøður fyri Kringvarpslógini.

- Nevndin er av teirri áskoðan, at fyri at kringvarpið kann varðveita tað óheftni, sum ein public-service stovnur eigur at hava, eigur at verða miðað ímóti, at tann bindingin, sum liggur í lýsingarinntøkum frá handilslýsingum í kringvarpinum verður niðurlagað í eitt 5 ára tíðarskeið. Samstundis ásannar nevndin, at tann fíggjarligi parturin eigur at uppvigast, siterar Tórbjørn Jacobsen nevndina, sum sat við uppskotinum, at hava skrivað.

Setir spurning við Kringvarpsgjaldið

Tórbjørn Jacobsen vísir somuleiðis á, at Kringvarpið er einasti fjølmiðil í Føroyum, ið fær skattligar inntøkur gjøgnum kringvarpsgaldið. Hann ivast um stovnurin hevur skattin uppiborinan.

- Legitimiteturin undir hesum skatti er public-service hugtakið. Megnar stovnurin ikki at lyfta ta uppgávuna, er onki grundarlag fyri licensgjaldinum, sigur hann.

### Endursendingar

Tjóðveldistingmaðurin harmast eisini skránna hjá Kringvarpinum.

- Framleiðsla er at kalla ongin, nú stovnurin brillierar við at endursenda lakar endursendingar frá eldri endursendingum upp í saman aftur í prime time. Hetta á hávetri, tá ið gomlu útvarpsmenninir plagdu at spenna seg út, fyri at nøkta tørvin hjá lurtarunum, við nýggjari framleiðslu, sigur Tórbjørn Jacobsen.



*Tórbjørn Jacobsen vil fegin hava greiðu á, hvat Mentamálaráðið ætlar at gera við Kringvarpið*




*Enn er bara ein tíðindaleiðari í Kringvarpinum. Tóbjørn Jacobsen vil vita, hvussu leingi hetta skal halda fram*

# Tíðindadeildin eisini fyri skotum

**Tað er tó ikki bara í samband við lýsingarnar, at Tórbjørn Jacobsen kundi hugsað sær nøkur svar frá Helenu Dam á Neystabø. Hann vil nevniliga eisini vita, hvør ætlanin er við tíðindaeindunum í Kringvarpinum**

KRINGVARP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri tað fyrsta, vil Tórbjørn Jacobsen vita, hvat Helena Dam á Neystabø hevur gjørt, fyri at loysa málið um tíðindaeindirnar hjá Kringvarpinum. Hann vil hava at vita, hvussu landsstýriskvinnan tulkar lógina, umframt, at hann vil hava at vita, um tað verða tvær tíðindadeildir, ella um tað heldur fram at vera ein.

Harnæst vil Tórbjørn Jacobsen fegin vita, um støðan í Kringvarpinum í dag er ein avleiðing av vánaligum samskifti millum Mentamálaráðið og Kringvarpið.

Til seinast vil hann eisini vita, hvussu langt arbeiðið við at gera ein public service sáttmála er komið, og nær hann verður lagdur fyri Tingið.

### Fjølmiðlasemjan

Í viðmerkingunum til spurningarnar vísir Tórbjørn Jacobsen aftur til fjølmiðlasemjuna, har stórur dentur varð lagdur á, at tvær ymiskar tíðindaeindir skuldu vera framyvir, fyri at verja integritetin hjá stovninum, umframt at syrgja fyri, at margfeldni helt fram at vera í tíðindaflutninginum.

- Hildið varð, at hesar einastu redaktiónirnar, ið ikki kundu ákærast fyri at renna ørindi fyri m.a. handilslig, politisk og átrúnaðarlig áhugamál, á henda hátt skuldu verjast fyri monopolisering av tíðindastreyminum, sigur Tórbjørn Jacobsen.

### Harmast skilið

Tað, sum Tórbjørn Jacobsen heldur vera so øgiliga harmiligt í hesum málið, er, at onnur enn tey, ið hava skrivað lógirnar fara at tulka tær øðrvísi, enn tær vóru ætlaðar.

- Tað tilkemur ikki tilvildarligum løgfrøðingum, landsstýrisfólkum, kringvarpsstýri ella stovninum sjálvum, at tulka kringvarpslógina øðrvísi enn hon varð samtykt, sigur hann. Hann vil somuleiðis vita, um Helena Dam á Neystabø ætlar at lata standa til, nú semjan eftir hansara tykki er brotin, samstundis, sum hetta er beinleiðis ímóti Tingsins vilja, sambært Torbirni Jacobsen.

Hann vísir somuleiðis á, at hetta mál hevur verið fyri fyrr í tingsetuni, og at tá komu boð, at málið skuldi loysast beinanvegin. Hetta dugir Tórbjørn Jacobsen ikki at síggja.